

Seinastu dagarnar hevur Magnus Heinason skotið seismikk í Skopunarfirði
Mynd: Bjarni Petersen/Landsverk

# Magnus Heinason skotið seismikk fyri Sandoyartunli

**Fólk frá Landsverki hava hesar seinastu dagarnar skotið seismikk í Skopunarfirði. Næsta stigið verður at gera kjarnuboringar**

SANDOYARTUNNIL
*Tíðindaskriv frá Landsverk*

Fólk frá Landsverki hava hesar seinastu dagarnar staðið við kanónirnar umborð á rannsóknarskipinum Magnusi Heinason.

Talan er um kanónir, sum verða brúktar til seismiskar kanningar. Endamálið hevur verið at kanna jarðfrøðina í havbotninum, har ætlanin er at gera Sandoyartunnilin, skrivar heimasíðan hjá Landsverki, www.lv.fo

Fyrstu seismisku kanningarnar vórðu gjørdar í fjør. Men neyðugt varð við fleiri kanningum fyri at fáa eitt betri grundarlag at byggja á.

Byrjað varð at skjóta seismikk sunnudagin og mikunáttina varð seinasta skotið latið av. Av tí at líkindini vóru sera góð gekk arbeiðið betri og skjótari enn væntað. Skotnar vórðu tilsamans 47 linjur og tað var nakað meira enn upprunaliga ætlað.

Skotið varð við linjuføringina, sum er løgd fyri Sandoyartunnilin. Hendan linjan gongur úr landinum sunnan fyri ferjuleguna við Gomlurætt og kemur upp nakað eystan fyri Skopun. Eisini hevur verið skotið eftir øðrum linjum fyri at kanna hvussu jarðfrøðin er aðrastaðni í Skopunarfirði.

Næsta stigið verður at viðgerða dáturnar, sum eru komnar til vega við teimum báðum kanningunum við seismiskum kanningum. Hetta er meira drúgvført arbeiði, sum kann taka fleiri mánaðir.

Næsta stigið í forkanningunum verður at gera kjarnuboringar, sum skulu staðfesta hvussu tilfarið er í undirgrundini. Ì hesum føri verður talan um sokallaðar stýrdar kjarnuboringar. Hetta merkir, at borað verður ikki bert eftir eini beinari linju, men at borast kann í ymsar ættir ella í ymsar vinklar.

Hetta krevur serliga útgerð, og so skjótt útgerð er tøk til hesa boring verður farið til verka.

Enn er ikki endaliga greitt nær sjálvt arbeiði at gera Sandoyartunnilin skal byrja. Hetta er ein politiskur spurnringur. Kortini er samtykt við lóg, at forkanningar skulu gerast av tunlinum og hevur Løgtingið játta penging til endamálið.

www.us.fo

## Landmátari

*Starv sum landmátari er tøkt innan matrikul- og útskiftingarøkið. Arbeiðið fatar serliga um málsviðgerð, uppmáting og marknaásetingar. Eisini fatar starvið um matrikulera ráðgeving og aðra lendisfyrisiting.*

**Førleikar**
Umsøkjarin skal hava prógv sum landmátari, verkfrøðingur ella líknandi útbúgving frá hægri læristovni. Tað er ein fyrimunur at hava royndir við matrikulerum arbeiði, útskifting og uppmáting við GPS, totalstatión og Microstatión.

**Starvsmøguleikar**
Vit vænta at umsøkjari er ábyrgdarfullur, hevur góð samstarvsevni og hevur hug at menna tað matrikulera arbeiðið í Føroyum. Vit kunnu tryggja eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar, møguleikar fyri persónligari menningar og sjálvstøðugum arbeiði.

**Setan**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fyrispurningar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:
Jákup Paula Joensen, stjóra,
á tlf +298 34 24 00, jakuppj@us.fo ella
Petur Nielsen, deildarleiðara,
tlf +298 34 24 24, peturn@us.fo

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 13. oktobur 2008. Umsóknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir
Ella teldupost: us@us.fo

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo

Sony Ecricsson C902i

# Oktobertilboð

Fartelefon við nógvum hentleikum, m.a. 5 MP myndatóli við blits og autofokus, Bluetooth, FM-útvarpi, MP3-spælara, vapp og myndaboðum. 512 MB minniskort fylgir við.

Fæst á vodafone.fo og í vodafone-handlunum.

**kr. 3795**



Løtan er tín

vodafone